Gamalt vín á nýggjar fløskur. *Nýggj hugtøk, sum nýveldi og nýggjur sáttmáli, eru komin inn í sjálvstýriskjakið. Men politikkurin hjá samgonguni er eftir øllum at døma óbroyttur. Føroyar skulu skipast sum fullveldisríki*

Mynd: Álvur Haraldsen

Orðini nýggj - ætlanin óbroytt

Orðini er broyt, men innihaldið er tað sama. Nýggj hugtøk eru komin inn í sjálvsstýrismálið, men alt bendir á, at landsstýrið setndur fast við ætlanina at skipa Føroyar sum fullvelsisríki

DÁNJAL HØJGAARD OG SVEINUR TRÓNDARSON

Orð kunnu gera stóran mun og nýggj orð kunnu fáa glið á eina fastlæsta støðu í sjálvsstýrismálinum.

Nógv bendir á at landsstýrið hevur valt sær bleytari og minni eldfim hugtøk enn hugtøk, við tí fyri eyga, at tryggja sær tað breiðu politisku semjuna í sjálvstýrismálinum.

Samfelagsfrøðingurin Suni á Dalbø fær eyga á tvinnanda orsøkir, til at nýggj orð eru komin upp í fullveldismálið.

-Tað er tvær forkláringar, sum næstan eru líka góðar. Onnur er, at samgongan hevur sæð í eyguni, at tað ikki ber til at fáa breiða undirtøku í fólkinum og í politisku flokkunum fyri fullveldinum. Hin er at mann umdoypir barnið, fyri at fáa tað meira átuligt, sigur Suni á Dalbø.

-Hugtakið fullveldi er vorðið eitt illavorið orð hjá summum, og næstan ein kravorð frá øðrum. Tí hevur landsstýrið kent á sær, at hetta orðið hevur við til at læsa kjakið fast. Við at skifta orðini úr, kunnu partarnir kanska semjast um eitt sindur meira, sigur hann.

Gamalt vín

Jóannes Eidesgaard, hevur sum formaður í Javnaðarflokkinum havt møguleika, at fylgja neyvt við fullveldismálinum, og eftir kaffifundirnar við samgonguna er hann ikki í iva um, at landsstýrið førir eitt taktisk spæl.

-Tað er sum at fylla gamalt vín á nýggjar fløskur, at ganga burtur frá sínum egnu orðum. Men tað er helst ein partur av politiska spælinum, sigur hann.

-Fyrr vildi Tjóðveldisflokkurin loysa, kvetta ella okkur sovorið, men fyri síðsta val vóru orðini skift úr við skipaða loysing. Síðani kom fullveldið, og nú er eftir øllum at enn ein nýtt orð komið inn. Men eg trúgvi framhaldandi at málið hjá samgonguni er fullveldi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Veljarakanning týdning

Samfelagsfrøðingurin, Jákup Strøm, heldur, at samgongan royndir at koma burturúr naggadódnini sum tykis at vera komin í sjálvstýrismálið.

-Fullveldið hevur fingið dám av loysningar-orðinum. Eitt orð sum nýveldi kann nettupp vera við til at bloyta upp, soleiðis at tað slept undan klandri um orð.

Jákup Strøm heldur at seinasta meiningakanningin, sum setti spurnartekin við undirtøkuna fyri fullveldinum, hevur givið samgonguna nakað at hugsa um.

-Seinasta veljarakanningin var ikki serliga pen. Tí fati eg eisini hetta nýggja orðið, nýveldið, sum ein útrætta hond, sigur hann.

Samgongan slakað

Suni á Dalbø heldur kortini, at málið snýr seg meira enn um orðaleik og nýggj hugtøk. Hann heldur, at samgongan í veruleikanum hevur slakað í sjálvsstýrismálinum.

-Eg haldi, at samgongan hevur bakkað. Mann kann loyva sær at seta spurnartekin við hvussu heilhugaðir t.d Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eru fyri fullveldinum. Her hugsi er m.a. um signalini, sum fólkaflokstingmenninir Óli Breckmann og Bjarni Djurholm leingi hava sent út. Og sjálvstýrisflokkurin gongur inn fyri sjálvstýri stig-fyristig, og bendir søgan ikki á, at tað vera teir sum bróta skalið á egginum. Sjálvt í Tjóðveldisflokkinum tykir mær, at tað eru fraktiónir, sum ikki eru hundrað prosent fyri loysing her og nú.

-Tískil kann tað vera mikið rætt politiskt, at bloyta uppi í loysnini, sigur Suni á Dalbø.

Vilja sleppa longur

Spurningur er so hvat landsstýrið vinnur við, at skifta retorikkin út, um málið framvegis er at at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

-Er tað Høgni Hoydal, sum hevur umdoypt barnið, so kundi eg hugsa mær, at hann tekur heitið fullveldið burturúr kjakinum fyri at sleppa longri í teimum spurningum, sum semja kann fáast um, sigur Suni á Dalbø.

-Tá hevur Høgni Hoydal óbeinleiðis flutt seg burtur frá fullveldinum, við tað at roynt verður at fiska eftir hvat annað mann kann blíva samdur um, sigur Suni á Dalbø.

-Eg trúgvi, at landsstýrissamgongan hevur skift jakkan út fyri at sleppa longri í samráðingunum. Men eg rokni eisini við, at hon í veruleikanum hevur bakka í fullveldismálinum, sigur hann.

Ódnartak at finna semju

Hóast fleiri kaffifundir, bendir alt á, at tað fer at vera torført at finna semju í sjálvstýrismálinum í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum.

DÁNJAL HØJGAARD OG SVEINUR TRÓNDARSON

Stóri spurningurin er, um tað fer at eydnast at finna eina breiða semju í Uttanlandsnevndini, ella um nevndin fer at bíta seg í bólkar.

Taka vit fráboðaninar frá Høgna Hoydal og Jóannesi Eidesgaard í SvF í seinastu viku, so er lítið sannlíkt, at semja fæst í lag.

Tað tykist meira sum, at partarnir standa við sítt, og tað merkir, at samgongan fer til Danmarkar at samráðast við einum lítlum meiriluta í rygginum.

Nærri men kortini langt frá

Sum sagt er endamálið við viðgerðini í uttanlandsnevndini at fáa eina breiða semju - um tað yvirhøvur ber til.. Hetta eru ymiskar meiningar um, og til dømis heldur Jákup Strøm, at tað verður torført at vinna burtur úr tí støðukríggi, sum partarnir hava læst seg í síðani fullveldismálið varð sett á skránna fyrstu ferð.

– Sum tað sær út, so standa teir so langt frá hvør øðrum, at tað verður trupult at fáa teir at semjast. Hvør heldur upp á sítt. Kortini haldi eg, at Javnaðarflokkurin hevur víst eina konstruktiva linju við ikki at avvísa samgonguna beinanvegin, sigur Jákup Strøm.

Suni á Dalbø, samfelagsfrøðingur, sigur at hann er sannførdur um, at samgongan fer at ganga í tveimum bólkum við samgonguni og andstøðuni í hvør sínum. Miðflokkurin er eitt sindur toførur at taka støðu til, tí Jenis av Rana ongantíð hevur sagt seg vera fyri fullveldinum, samstundis, sum trupulleikarnir við pensjónunum og landssjúkrahúsinum seta spurnartekin við hansara loyalitet móti samgonguni í hesum málinum.

Tískil er samanhangur millum tað, sum samfelagsfrøðingarnir og politikararnir siga:

Útlitini fyri eini semju eru ikki góð.

Ganga ikki ímóti samgonguni

Ein annar møguleiki er sjálvandi, at partar av samgongulimunum í Uttanlandsnevndini fara at ganga ímóti viljanum hjá samgonguni og gera eitt tilmæli, saman við t. d. Javnaðarflokkinum.

Men hetta heldur Hergeir Nielsen, formaður í Uttanlandsnevndini lítið um.

– Møguleikin er har, at ein meiriluti kemur fram til eina aðra loysn enn tað landsstýrið mælir til, men tað meti eg vera ógvuliga lítið sannlíkt, sigur Hergeir Nielsen og leggur afturat:

– Samgongan hevur ein arbeiðssetning, sum hon er samd um, bæði í samgonguskjalinum og í løgtingssamtyktini og sum málsgongdin hevur verið yvirhøvur. Tað hevði verið sera óheppið um tann møguleikin stakk seg upp.

Jóannes Eidesgaard sigur um henda spurning, at hann metir at nevndarlimirnir hjá samgonguni í Uttanlandsnevndini og landsstýrið arbeiða so mikið væl saman, at hetta neyvan hendir.

Breið orðing

Hin møguleikin er, at Uttanlandsnevndin kemur ásamt um eina breitt orðaða semju, um at gerast skal ein nýggjur sáttmáli millum Føroyar og Danmark. Og tað verður so ikki fullveldið, sigur Suni á Dalbø.

– Tað kann vera ein nýggj heimastýrislóg ella eita sjálvstýrislóg ella frælsur felagsskapur, men fer ikki at eita sjálvstýrislóg, tí Javnaðarflokkurin hevur nýtt tað heitið.

– Fyri yvirhøvur at halda viðgerðini og kjakinum ígongd, so velur man ikki at kalla tað sjálvstýrislóg, sum kann tengjast at Javnaðarflokkinum ella fullveldi, sum kann tengjast at Tjóðveldisflokkinum, sigur Suni á Dalbø.

Standa veikari

Sum støðan er í løtuni, so er mest sannlíkt, at landsstýrið fer til Danmarkar at samráðast við tí meirilutanum, sum var í løgtinginum tá uppskotið til samtyktar varð samtykt í tinginum.

Hetta er ikki tann besta støðan at standa í, tí samgongan hevði verið munandi sterkari um so var, at ein breiður meiriluti fekst, sum gav ábendingar um, at so nógvir tingmenn, sum yvirhøvur gjørligt taka undir við samráðingarupplegginum.

Tað hevur verið sagt fleiri ferðir, at júst henda støðan fer at hava við sær, at føroyska samráðingarnevndin fer at standa veikari í samráðingunum enn hon annars vildi havt gjørt.

Limirnir í Uttanlandsnevndini eru: Hergeir Nielsen, formaður, Jógvan við Keldu, Jákup Sverri Kass, Heðin Mortensen, Jenis av Rana, Edmund Joensen, Jóannes Eidesgaard. Hans Pauli Strøm, sum sæst á myndini, er varamaður hjá Jóannesi Eidesgaard **savnsmynd**

Uttanlandsnevndin skal skriva álit

Uppritið hjá landsstýrinum til ein nýggjan sáttmála millum Føroyar og Danmark verður nú lagt fyri uttanlandsnevndina hjá løgtinginum

DÁNJAL HØJGAARD

Stýrisskipanarlógin ásetir, at landsstýrið skal ráðføra seg við uttanlandsnevndina í uttanlandsmálum, sum hava stóran týdning fyri Føroyar. Hendan viðgerð fer fram í trúnaði og í tøttum samstarvi við umboð fyri landsstýrið.

Lesa uppá

Hergeir Nielsen sigur, at teir sjey tingliminir í uttanlandsnevndini fara fyrst og fyrst og fremst at lesa væl upp á.

-Tað er trupult at siga frammaundan hvussu arbeiðsgongdin í nevndini verður. Hetta er nakað limirnir í nevndini mugu semjast um, sigur nevndarformaðurin.

-Hetta er eitt stórt og álvarsamt mál. Fyrst fara vit at lesa tað ígjøgnum. Harnæst fara vit, at ganga ígjøgnum smálutirnar, og vita hvussu tað er skilabest at arbeiða viðari við tí.

Eingin freist ásett

Sambært nevndarformanninum er eingin tíðarfreist ásett fyri nær uttanlandsnevndin skal vera liður við arbeiði sítt.

-Vit taka okkum tað tíð, sum vit halda er neyðug, soleiðis at vit eru fullgreiðir yvir hvat ið liggur í málinum áðrenn vit lata tað frá okkum aftur.

-Kann viðgerðin koma at taka mánaðir?

-Hon kann taka mánaðir, hon kann taka ár, men hon kann eisini koma at taka vikur og dagar. Tað er ringt at siga fyrr enn vit hava sæð uppleggið.

Eitt álit - kanska fleir

Sambært Hergeir Nielsen skal uttanlandsnevndin skriva álit í sjálvsstýrismálinum. Sum ein fordømi nevnir hann málið um marknatrætuna við Bretland, har uttanlandsnevndin hevði tvey tilmæli - eitt fyri og eitt ímóti.

Fæst ikki semju í uttanlandsnevndini, so verða skrivað meirluta- og minnilutatilmæli, sigur Hergeir Nielsen,

-Um so er at vit ikki kunnu semjast í hesum málinum so mugu skrivast nakrar grundgevingar fyri hví mann er samdur og ósamdur, sigur nevndarformaðurin, sum greiðir frá, at nevndin fer at vera í støðunum sambandi við landsstýrismannin í sjálvstýrismálum, Høgna Hoydal.

Hergeir Nielsen

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF

ÚTSØLA

÷40%

Byrjar hósmorgunin kl. 08.00

Opið er til kl. 18.00

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF